# Tøkningur til Kringvarp Føroya

**Vit sóknast eftir einum ídnum og dugnaligum fólki til tøknideildina, sum í høvuðsheitum skal arbeiða við sendiuppgávum (MCR), tøkniuppgávum og ljóðarbeiði**

**Starvið**
Títt fokusøki verður í høvuðsheitum sendi-, ljóð- og tøkniarbeiði. Uppgávurnar fevna eitt nú um:

- Sendivaktir
- Framleiðsluvaktir
- Ljóðeftirviðgerð
- Fjarsamskifti
- Framleiðslur uttan fyri húsið

**Tínir førleikar**

- Tú hevur royndir við ljóðarbeiði
- Tú kennir til talgilda framleiðslu
- Góða tøkniliga vitan
- Vitan um útvarps- og sjónvarpsframleiðslu er ein fyrimunur

**Tínir eginleikar**

- Fyrst og fremst ert tú eldhugað/ur í yrkinum
- Tú hevur áræði at seta teg inn í nýggja tøkni
- Tú ert røkin, fryntlig/ur og hevur góð samstarvsevni
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, men eisini í toymi

**Vit kunnu bjóða**

- Eitt spennandi arbeiði við skiftandi uppgávum
- Eitt starv við møguleikum at menna seg innan miðlatøkni

Arbeiðstíðirnar kunnu vera skiftandi, eisini kemur vikuskiftisarbeiði fyri.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sum skjótast ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Umsóknarfreistin er 20. september á midnátt, og umsóknir skulu sendast til umsokn@kvf.fo

Royndartíðin í starvinum er 3 mánaðir.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hjallgrím P. Hentze, deildarleiðara, á telefon 296601 ella teldupost: hen@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur, almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við 7 limum stjórnar stovninum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá spølum og lýsingum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir; Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Fíggjarætlanin er 57,5 mió kr. Í Kringvarpi Føroya eru 76 ársverk.*